# Hátíðarlig Mikinesløta í Listaskálanum

MIKINES 100

Í vikuni kom snotuligi Listaskálin í Havn enn einaferð til sín rætt, tá borðreitt varð við eini samanblanding av list, tónleiki og vælvaldum orðum. Tá varð stórverkið og kanska eitt tað størsta einstaka bókaverk givið út á føroyskum alment víst fram – bókin um okkara fræga listamálara, Sámal Joensen-Mikines, sála.

Tað var sjálvur mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni, sum hevði boðið til hesa stórfingnu móttøku. Har vóru Jóannes Eidesgaard, løgmaður og Heðin Mortensen, borgarstjóri umframt tey fólkini, sum hava staðið fyri hesi nýggjastu bókaútgávuni um Mikines. Tey eru sonur Mikines, Kári Mikines, lækni, Einar Matthiasson og Erna Sørensen, bókaforleggjarar, Aðalstein Ingólfsson, rithøvundi og Lissi Joensen. Millum tey mongu innbodnu var eisini Bárður Jákupsson, sum hevur gingið rithøvundanum til handa. Bárður skrivaði eisini bók um Mikines, sum kom út í 1990.

Bókin "Mikines 100" verður givin út í sambandi við, at tað eru 100 ár síðani, at listarmálarin varð føddur.

Á samkomuni í Listaskálanum spældi Sámal Petersen nøkur løg uppá violin. Eisini sang Sanna í Brekkunum við undirspæli av Martin Restorff Jacobsen. Her var talan um tónleik, sum Mikines, sáli hevði stóran alsk til.

# Mikines setir Føroyar á heimsk




*Tey, sum hava staðið fyri útgávuni, til samkomuna í Listaskálanum*

**- Eg skal vegna Mentamálaráðið takka forleggjara og høvundum hjartaliga fyri, at vit við hesi stórtøknu og prýðiligu bókaútgávu hava fingið eitt virðismikið íkast til hesa tilgongd. Við hesum trimum útgávum á føroyskum, donskum og enskum kann kunnleikin um Mikines røkka til norðurlond og eisini tann stóra ensktalandi alheimin segði Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður á samkomuni, tá bókin um Mikines varð løgd fram. Hann segði annars:**

MIKINES 100

*Myndir. Jens Kristian Vang*

- Tað at Føroya fyrsta professionella listafólk, Sámal Elias úr Innistovu í Mykinesi, kom heimaftur, eftir at akademitíðin í Keypmannahavn var av, var ein fráboðan um, at nýskapandi list skuldi gerast ein samfelagstáttur í Føroyum. Skaldskapin høvdu vit altíð haft, men aðrar listagreinar skuldu sum frá leið gerast ein nýggj dimensjón í mentan okkara. Hetta var í 1932, og líta vit afturá, mega vit ásanna, at tíðin var ikki rættiliga búgvin enn. Hesa ásannan eiga vit at leggja okkum í geyma.

Hóast hesin ungi listamaðurin møtti bæði vælvild og virðing ímillum manna, bar ikki til hjá honum at støðast í Føroyum. Her var ikki eitt listaligt umhvørvi, hann kundi trívast í, og ongar avbjóðingar, hann kundi mennast av. Sum frá leið fór hann at kenna seg einsamallan og avbyrgdan. Endin varð, sum kunnugt, at hann gjørdi av at fara av landinum aftur og búseta seg í stórbýnum, og fjórðingsøld skuldi ganga, áðrenn eitt rættiligt listaligt umhvørvifór at mennast her í Føroyum. Tað er tó eingin, sum ivast í, hvaðani íblásturin til myndirnar kom frá. Her var tað ikki stórbýurin men "periferiin", sum var avmyndað á lørift-inum. Tað tykist sum um, at tað var tað tronga, tað tunga, tað dapra, sum kveikti meðan stórbýarinnar víðskygni, breiðu karmar og listarliga umhvørvi